# Súgurin og hunangurin

***Novemburmorgun* eftir Vidu A. Højgaard er eitt samansett yrkingasavn við góðum, poetiskum myndum og beinraknum hugsanum**

## Ummæli



**MalanMarnersdóttir**

Ein av yrkingunum í savninum *Novemburmorgun* eftir Vidu Akselsdóttur Højgaard lýsir á beinraknan hátt stríðið, sum kann leika á í sinninumm, sum ein mótsetning millum súgir í sjónum og hunang í glasi. Perman á yrkingasavninum er ein fotomynd av einum landslagi í rísandi heystsól. Hegnpelar í forgrundini, myrkt land, ein fjørður við umhvarvinum av eini alistøð og eitt blýgrátt skýggj oman fyri landslagið liggja líkasum inn yvir ta hunangslittu (onkur, sum ikki hevur lisið savnið hevði kanska sagt koparlittu) og blágráu-gulu luftina. Myndin hóskar til heitið á bókini og til tað álvarsama og mangan hugtunga lagið í savninum. Um myndin hevur ein farra av onkrum léttisoppakendum, so fánar hann, tá myndin verður hildin saman við innihaldinum í bókini. Yrkingarnar eru skiftar sundur í tríggjar partar: Novemburmorgun, Skuggabreyt og Lívsdansur – og viðgera lívsins ljósu og myrku síður.




Yrkingasavnið »Novemburmorgun« er eyðkent av rámandi, ótilgjørdum myndamáli

Yrkingarnar í teimum báðum fyrstu pørtunum eru fríar yrkingar, prosayrkingar, sum eru bornar av stavrímum og innrímum:

*Í nátt var eg*
*í urtagarðinum Eden*
*har maður og kvinna í upphavi*
*lutaðu himmalin ímillum sín.*

Myndirnar eru ofta sum í hesum dømi settar saman av onkrum kendum t.d. úr Bíbliuni, sum síðani verður loyst sundur í reglunum, sum koma aftaná: "og eg át av fruktunum/ óspiltar/ hóast syndafallið". Nakað sama sundurloysing av kendari hugmynd er at finna í "Óttans hav", sum er ein tann mest spennandi yrkingin í savninum, og sum er eitt dømi um, hvussu væl Vida Akselsdóttir Højgaard kann seta yrkingar sínar saman.:

*Tú sigur*
*at eg skal ikki óttast*
*at eg átti at hvílt*
*tí at Gud er*
*men tú kennir ikki*
*súgin*
*niðast við svørtu klettarnar*
*sum svevur og vaknar*
*eftir egnum tykki*
*tíni vøtn eru kvirr*
*sum hunangur í glasi*
*bera teg uppi*
*allan sólarringin*

Eftir staðfestingina av hvør ið talar, kemur tað sagda fram í tveimum javnsettum reglum: skaldið "skal" og "átti". Síðani kemur orsakasambindingarorðið "tí", og tann avgjørda staðfesting av, at "Gud er" – sum um tað er ein sannroynd, sum ikki krevur nærri frágreiðing.

Sambindingarorð sum "tí, men", "og, ella", sum ávikavist seta í mun til og reksa upp, koma heilt ofta fyri í savninum, og tey vísa til tað ta leiting, sum fer fram í yrkingunum. Yrkjarar, sum vilja leggja sum mest til lesararnar at skapa samanhang, høvdu kanska lagt summi av hesum sambindingarorðum burturúr. Hjá Vidu eru tey við til at gera yrkingarnar léttar at lesa. Hinvegin krevja yrkingarnar, at lesarin greinar tær fyri at finna, hvar setningar enda og skifta, tí eingi tekn eru og bara fyrsta orðið í yrkingunum er við stórum.

Yrkingin "Einsemi" er somuleiðis áhugaverd og eyðkend fyri yrkingalagið í savninum. Hon leggur fyri við at staðfesta tað, sum "Tey siga". Talan er tó ikki um bý- og bygdaslatur, men um eitt sitat eftir enska barokkskaldið John Donne úr *Meditations XVII*, 1624: "No man is an island; entire of itself;" – eingin menniskja er ein oyggj fullkomiliga fyri seg, og Donne heldur fram: ein og hvør menniskja er partur av meginlandinum. Hesa hugsan setur yrkingin upp í móti sálarligum einsemi, sum tey flestu munnu kenna, og lýsir beinrakið og knapt lívið sum eina "oyðimarkarferð/ har eingin er at taka viðførið".

Viðhvørt verður kanska gjørt nakað nógv av. "Andvekur" er ein frálík yrking, sum lýsir svøvnloysi sum óbodnar gestir. Men tað kennist óneyðugt at skoyta uppí, at skaldið hevur biðið teir halda sær burtur. Beinrakna lýsingin av hesum óbodnu gestum býr í "andaleypinum (...) tá dagsins meldur/ ikki longur/ verjir móti innrás".

Hetta eru ikki lýti og als einki ímóti dygdunum í savninum, sum er eyðkent av rámandi, ótilgjørdum myndamáli.

Tilburðaryrkingarnar eru um ta stóru ódnina í 1988, syndarligu flogvanlukkuna á Stord og um tá ein dóttir eigur. Saman við yrkingini "At vera foreldur" eru hesar yrkingar á heilt aðrari breyt – tær eru sannar, men ikki yrkingar á sama stigi sum hinar.

Yrkingarnar í tí seinasta partinum hava heitið "Lívsdansur – blandaðar rímur". Tær bera upp á rím, hava í støðum heldur nógv stavrím, og her byrjar hvørt ørindi við stórum og hava kommu. Tær tykjast yrktar til løg – ella kunnu léttliga fáa løg. Eitt nú hevði seinasta yrkingin, sum er andalig uttan at nevna Várharra, hóskað millum sangirnar um mannalívið í *Songbók Føroya fólks*, um hon fekk eitt gott lag.

Sosialurin